

*Bill Clinton brúkti Hotel Føroyar sum basu við vitjan síni í Føroyum*

# Nú eitur tað Clinton-suitan

**Á Hotel Føroyum fara tey at broyta nøvnini á suitunum, har tann ein frameftir fer at eita Clinton-suitan**

CLINTONVITJAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er einki at taka seg aftur í, at Bill Clinton telist millum allarstørstu nøvnini, sum hava sett fót á Føroyska jørð. Og tí er heldur einki undarligt í, at hetta setir síni spor eftir seg.

Ein av teimum heilt ítøkiligu avleiðingunum er, at Hotel Føroyar broytir suitunøvnini.

- Vit hava tvær fínar suitur og tvær eitt sindur minni. Tær báðar stóru og fínu hava higartil itið Løgmanssuitan og Brúðarsuitan, meðan tær báðar smærru hava verið nevndar juniorsuitur. Nú fer Løgmanssuitan at eita Clintonsuitan, Brúðarsuitan broytir navn til Løgmanssuitan, meðan tær báðar smærru frameftir fara at eita brúðarsuitur, sigur Johannes Jensen, stjóri á Hotel Føroyum.

Hann sigur, at tey hesi seinastu seks árini hava skrásett allar týðandi vitjanir av kendum fólki, tað verið seg fótbóltsleikarar, tónleikarar ella onnur kend fólk. So tey vita nágreiniliga hvør hevur búð hvar og nær.

Tað gevur hotellinum eitt ávíst virði, at ein so kendur maður sum Bill Clinton hevur verið her. Og eg segði honum eisini, at vit fóru at broyta navnið á suituni til Clintonsuitan. Tað flenti hann at, sigur Johannes Jensen.

# Sofie, Chelsea og Hillary

**Tær hava allar eitt til felags: Føroyskar troyggjur frá Guðrun & Guðrun**

CLINTONVITJAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var eitt sindur uttanfyri skránna, tá Bill Clinton gjørdi av at fara ein túr í býin at keypa okkurt tinganest heim við aftur til konu og barn.

Og tað gjørdist Guðrun & Guðrun, sum fekk heiðurin av at selja troyggjur og turriklæði til fyrrverandi amerikanska forsetan.

Hann var her inni eina góða løtu, í hvussu er einar tíggju minuttir. Tíverri var Guðrun (Ludvig) ikki her, tá Bill Clinton stakk inn á gólvið, so hon fekk ikki vitjanina við, sigur Guðrun Rógvadóttir.

Annars hendi tað, at gjaldskortið vildi ikki rigga, og tí fór ein av lívvaktunum út í bilin við Guðrun og taldi henni dollarar í hondina at gjalda fyri vørurnar.

Tað sigur seg sjálvt, at tað er ikki bert forkunnugt at fáa slíka vitjan, tað er sanniliga eisini talan um eina prestigusøk. Og sjálvt um tær báðar ikki vilja gera so ógvuliga nógv burtur úr, so verður helst eitthvørt at síggja og frætta um Clintonvitjanina á heimasíðu teirra í framtíðini.



*Tað vóru troyggjur og turrikløð av hesum slagi, sum fyrrverandi amerikanski forsetin keypti frá Guðrun & Guðrun*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tær báðar hava sum er fingið væl av umtalu í sambandi við troyggjurnar, sum Sofie Gråbøl er ílatin í spenningsrøðini Forbrydelsen. Verður ein komandi kvinnuligur forseti at síggja í troyggju ella turriklæði frá Guðrun & Guðrun, verður umtalan neyvan minni.

Annars kemur kenda mótablaðið Eurowoman til Føroya at taka upp føroyskan móta, millum annað framleiðslur frá Guðrun & Guðrun.



*Guðrun Ludvig og Guðrun Rógvadóttir, kvinnurnar aftan fyri sniðgevarafyritøkuna Guðrun & Guðrun*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




*Secret Service-fólk ansaðu sera væl eftir fyrrverandi forsetanum undir Føroyavitjanini*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Heimspressan fylgdi við

**Tað er ikki farið óansað aftur við borðinum, at Bill Clinton vitjaði í Føroyum í gjár. Heimspressan fylgdi honum**

CLINTONVITJAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í dag er hann á vitjan í Danmark, men í gjár setti Bill Clinton veruliga Føroyar á heimskortið.

Fyrrverandi forsetin var ikki bert umgyrdur av lívverjum. Har var eisini ein stórur partur av heimspressuni til staðar undir vitjan hansara.

Ein teirra, sum í nakrar dagar hevur verið í Føroyum, er tíðindamaðurin hjá stóra franska tíðindastovninum, AFP, Slim Allagui. Hann er franskmaður, men býr í Danmark og giftur danskari konu. Hann tosar somuleiðis eisini danskt.

Føroyar liggja undir hansara øki, og tí var tað náttúrligt, at hann kom hendan vegin í sambandi við vitjanina hjá Clinton. Tíðindastovan er ein av teimum heilt stóru, og orð hansara fara um allan heim.

Men hetta er kortini ikki fyrsta ferðin, at Allagui vitjar í Føroyum. Hann var longu her í 1992 í sambandi við stóru bankakreppuna, og síðani hevur hann verið aftur nakrar ferðirnar.

Slim Allagui kom til Føroya sunnukvøldið og hann fer av landinum aftur í annaðkvøld.

*Allastaðni har hann kom, heilsaði Clinton upp á tey, sum vóru møtt upp*

